# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit sleppa ikki málinum, sjálvt um løgreglan ger tað. Tvørturímóti herða vit okkara kanningar*
*(sakførari hjá McCann-hjúnunum)*

# Løgreglan slept málinum um Madeleine McCann

**Portugisiska løgreglan leggur nú málið um ta horvnu Madeleine McCann í skuffuna, tí hóast drúgvar kanningar hevur løgreglan onga hóming av, hvussu gentan hvarv, ella hvar hon er**



*Madeleine McCann hevði júst fylt fýra ár, tá hon hvarv tann 3. mai í fjør*
*(Mynd: Polfoto)*

Sambært portugisiska blaðnum Jornal de Noticias er løgreglan komin til ta niðurstøðu, at tað ber ikki til at finna nakran ella nøkur sek í málinum um Madeleine McCann. Tí hevur kanningardeildin hjá løgregluni gjørt av at gevast við kanningunum, og keldur siga fyri blaðnum, at hetta helst merkir, at málið verður slept.

Í hesum døgum eru 14 mánaðir, síðani Madeleine McCann hvarv úr einari íbúð í Portugal, men hóast umfatandi kanningar hevur løgreglan ikki kunnað staðfest, um talan var um dráp ella burturflyting.

Løgreglan hevði leingi illgruna til foreldrini hjá Madeleine, men sambært Jornal de Noticias hevur løgreglan ásannað, at hon hevur einki prógv, sum knýtir foreldrini at einari møguligari brotsgerð. Ein triði persónur, Robert Murat, hevur eisini verið undir illgruna, men løgreglan hevur seinni sagt, at hon hevur heldur eingi prógv ímóti honum.

Portugisiski verjin hjá McCann-hjúnunum, Carlos Pinto de Abreu, sigur við Jornal de Noticias, at málið um Madeleine verður ikki slept her, tí gevst løgreglan við sínum kanningum, fara hann og foreldrini at leggja so mikið størri dent á at loysa gátuna um ta horvnu gentuna.



*Gerry og Kate McCann. Portugisiska løgreglan sigur, at hon kann ikki prógva, at tey medvirkaðu til, at dóttirin hvarv*
*(Mynd: Polfoto)*

# Suðurafrika ætlar at loysa kreppuna í Zimbabwe

**Suðurafrikanskir diplomatar eru í ferð við at leggja síðstu hond á eitt uppskot, sum skal loysa ta politisku kreppuna í Zimbabwe**

Høvuðstátturin í suðurafrikanska uppskotinum er at fáa stjórnarflokkin hjá Robert Mugabe og andstøðuflokkin hjá Morgan Tsvangirai til samráðingarborðið við tí fyri eyga at skipa eina samgongu- og savningarstjórn.

Tað skrivar suðurafrikanska blaðið Business Day í dag. Eygleiðarar siga tað vera áhugavert, at tíðindini koma sama dag, sum leiðararnir á afrikanska toppfundinum í Egyptalandi skulu umrøða, hvat skal gerast við ta politisku kreppuna í Zimbabwe.

Sambært Business Day miðjar suðurafrikanska ætlanin eisini eftir, at Zimbabwe skal hava nýggja grundlóg, og at tann politiska skipanin skal endurskoðast og umskipast.





*Suðurafrika vil hava Robert Mugabe og Morgan Tsvangirai at tingast um eina savningarstjórn*
*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Sviar mótmæla enn

Svíar mótmæla framvegis avgerðini hjá Ríkisdegnum at herða lógirnar, sum skulu forða yvirgangi, og sum elvdi til nógv kjak í Svøríki. Fyrradagin heitti blaðið Expressen á sviar um at siga sína hugsan, og Christina Green, talskvinna hjá Ríkisdegnum, sigur, at tað fyrsta samdøgrið aftan á áheitanina fingu tingfólk 1,1 millión teldupostar.

Ein meiningakanning herfyri vísti, at 47 prosent av svenska fólkinum eru ímóti at herða yvirgangslógirnar, og at 36 prosent eru fyri. Uppskotið fekk eisini tepran meiriluta í Ríkisdegnum. 142 tinglimir atkvøddu fyri tí, meðan 138 atkvøddu ímóti.

### Býflugur sluppu leysar

Tað var heppið fyri fólkið í kanadiska býnum New Brunswick, at tað regnaði mánanáttina. Uttan fyri býin var ein lastbilaførari so óheppin, at bilurin holdvist. Á lastini hevði hann 330 kassar við 12 milliónum býflugum. Myndugleikarnir sendu alt fyri eitt serfrøðingar á staðið, fólk í heilsuverkinum vórðu varskógvað, men tað eydnaðist at savna meginpartin av býflugunum, skrivar blaðið The Canadian Press. Tey serkønu siga, at tað var heppið, at tað regnaði, tí tá tíma býflugurnar ikki á flog. Hevði tað harafturímóti verið turt, høvdu tær nógvu býflugurnar farið í allar ættir, skrivar blaðið.



*Fleiri milliónir býflugur sluppu leysar*
*(Mynd: DR)*